Sosialurin

# VARPIÐ

TV TELEVARPIÐ



Dr1 • Hósdag 21. kl. 21.35

**»Hul igennem (1)« - nýggj røð á DR1**

Nick Cutter trýr ikki sínum egnu eygum. Hann er evolution-zoologur og stendur beint frammanfyri nøkrum dinosaurum, sum bráddliga vísa seg í Onglandi. Abby er djóraansari og fær nú hesar ikki-so-heilt-útdeyðu verur at ansa. Hetta er absolutt ikki vandaleyst. Bretsk aktion/adventure-røð.



Kanal4 • Mikudag 20. kl. 21.30

**»Dinesen (1)«**

Hendan nýggja sendirøðin á Kanal 4 fer at snúgva seg um móta, tónleik, mentan og annars stór mentanartiltøk. Í kvøld eru modellin Lykke May og myndamaðurin Henrik Bülow við í sendingini. Men eisini var verturin í sendingini í Føroyum, har Guðrun & Guðrun skipaðu fyri stórum mótatiltaki.



Dk4 • Fríggjadag 15. kl. 22.50

**»Møllehave møder: Preben Ahlefeldt-Laurvig«**

Tey flestu kenna danska prestin og teinkjaran Johannes Møllehave. Men Preben Ahlefeldt-Laurvig er neyvan so kendur. Hesin er tann síðsti len-greivin í danska kongaríkinum og situr hann í Tranekær slottinum á Langeland. Í sendingini verður prátað um søguna hjá hesi greiva-familju.

**Fríggjadagur 15. februar 2008**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**